# Setrið selur seg



*Jákup Weihe spældi sjónvarpshungrandi kvinna, sum var púra vekk í X-factor og øðrum sjónvarpskappingum. - Og um tit fara á Setrið og eru íðin og lesa nógv, sleppa tit í bestu sendingina í føroyska sjónvarpinum, føroyska svarið til útlendskar hyggjaramagnetir: SPEKI, segði lekra daman*



*Nýggi skrivarin á Setrinum, Vár í Ólavsstovu, skipaði fyri tiltakinum í Miðlahúsinum. Bæði starvsfólk og lesandi á Fróðskaparsetrinum løgdu dent á teir fyrimunir í eru við at lesa í Føroyum: Tú hevur tættari samband við lærarnar, og tú fært ein føroyskan vinkul til vitanina*



*Boys in a Band rokkaðu og larmaðu, so gamlir universitets-professarar máttu rýma. Hóast hølini vóru lítil og fólkini eitt sindur fá, so vóru Boys in a Band ikki minni villir, flipputur og professionellir fyri tað*

**Fróðskaparsetrið skipaði í gjárkvøldi fyri studentakvøldi í Miðlahúsinum, har kunnað varð um møguleikarnar fyri víðari lestri á føroyska universitetinum. Á leið 40 ung høvdu leitað sær oman í Vágsbotn, og tey fingu bæði bæði kunning, tónleik og skemt**

ÚTBÚGVING
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Myndir: Benjamin Rasmussen*

Fróðskaparsetur Føroya er eitt lítið og livandi universitet, sum fegið vil hava fleiri lesandi. Hetta var høvuðsboðskapurin í Miðlahúsinum í gjárkvøldið.

Og fyri at peppa tiltak og ímyndina vóru føroysku granskarnir farnir í samstarv við fremstu nøvnini innan føroyskt undirhald og føroyskan tónleik.

Bogi Hansen, havfrøðingur, greiddi frá um Náttúruvísindadeildina, sum í summar bjóðar tríggjar útbúgvingar, eina nýggja KT útbúgving, eina nýggja samansetta hav- og jarðfrøðisútbúgving og so vanligu lívfrøðiútbúgvinga, sum tó er meira smidlig enn vanligt, tí tað verður møguleiki at velja modulir frá hinum báðum útbúgvingunum.

Føroyamálsdeildin tekur eisini ein flokk inn, men hóast fígging nú er til ein flokk á søgu- og samfelagsdeildini, er fíggjarlógin komin so seint, at ein flokkur ikki kann takast inn fyrr enn fyrst í komandi ári.

Á leið 40 ung vóru komin at lurta eftir framløgum, skemti og tónleiki. Og sambært Eir í Ólavsstovu, fyriskipara, var talan um ung, sum umhugsaðu Fróðskaparsetri.

- Eg hevði kanska vænta, at Jákup Weihe og Boys in a Band fóru at tiltrekkja ungfólk, sum mest komu at lurta eftir teimum, men so var ikki. Tey sum komu, komu fyri at hoyra um møguleikarnar á Setrinum.



T Ø K K

Øllum tykkum, sum á einhvønn hátt heilsaðu mær á 60 ára degi mínum, takki eg hjartaliga.

Sólrún Michelsen